# Eivør millum tey mest spældu



**Sangurin »Við gengum tvø« hjá Eivør Pálsdóttir taldist millum teir mest spældu sangirnar á íslendsku Rás 2 í fjør. Útvarpsrásin hevur gjørt upp, hvørjir sangir vóru mest at hoyra í 2003**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Tað eru nógv útlendsk nøvn á Top 20 listanum, sum Rás 2 hevur gjørt fyri 2003. Íslendsku nøvnini eru hinvegin færri í tali.

Føroyska Eivør Pálsdóttir er nummar 14, og hóast hon má lúta fyri eitt nú Travis, Radiohead og Pink, so kann hon breggja sær av at vera frammanfyri eitt nú poppdrotningina Madonnu.

Ovast á listanum eru bretsku Oasis við sanginum Songbird, og Blur er nummar 2. Tað er næstan sum miðskeiðis í nítiárunum, tá ið Oasis og Blur plagdu at kappast á toppinum á bretska hitlistanum.

Onkrir av tónleikarunum í Blur búgva í Reykjavík.

Tað er ikki bara í útvarpinum, at íslendingar vilja hoyra Eivør, tí fløgan hjá henni, Krákan, hevur selt næstan 6000 eintøk, síðani hon kom út seint í fjør. Sølan heldur fram, og roknað verður við, at nøkur túsund eintøk verða seld afturat.

# Nú skal Petsy royna seg

**Petsy Tvørfoss úr Gøtu skal syngja sangin »Mest når det er regn« í danska Grand Prixnum, sum verður hildið 7. februar. Sangurin er skrivaður av Niels Drevsholt**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Danmarks Radio greiddi mikudagin almenninginum frá, hvørji fólkini verða, sum skulu framføra teir 10 sangirnar í danska Melodi Grand Prixnum.

Ein av sangarunum er føroyingur. Tað er Petsi Tvørfoss, sum annars ikki hevur verið nakað serligt frammi í sambandi við tónleik. Men nú sleppur hon rættiliga at royna seg.

Petsy, sum er ættað úr Gøtu, hevur búð niðri í nógv ár. Hon tók í summar studentsprógv og gongur nú á MGK, sum er ein trý ára fyrireiking til tónleikakonservatiorii. Pesty gongur í løtuni til upptøkuroynd á Jysk Musikkonservatorium, har hon higartil er komin ígjøgnum sangroyndina.

### Sonurin hevur viðmælt

Tað er Niels Drevsholt, sum áður hevur skrivað sangir til danska Grand Prixið, sum hevur skrivað sangin, ið Pesty skal syngja.

Petsy hevur gingið á studentaskúla saman við soninum hjá Niels, og tað er umvegis hann, at Petsy er komin inn í myndina.

Pesty skal á pallin sum nummar 3 í røðini av teimum 10 sangunum, sum verða við.

Hesaferð verður danska Grand Prixið hildið í Atletion í Århus, og vinnarin sleppur at umboða Danmark í hálvfinaluni í Turkaland 12. mai. Frá hálvfinaluni sleppa 10 teir bestu sangirnir við til til finaluna, sum verður hildin tríggjar dagar seinni, tann 15. mai.

DR fer sum vanligt at senda beinleiðis frá danska og altjóða Grand Prixnum, og mann SvF ikki eisini fara at senda Petsy og hini út í luftina 7. februar.




## Ein sterk vinna

Vinnulív og vinnupolitikkur eru míni hjartamál. Øki, sum eg havi fingist við alt mítt lív. Ein væl virkandi vinna er fortreytin fyri, at føroyingar menna ein sjálvberandi búskap, sum ger okkum harrar í egnum húsi. Tað er ikki lætt, men við hegni og hørðum arbeiði skal tað hepnast.

Neyðugt er at seta út í kortið av nýggjum, nú búskaparliga viðrákið ikki er eins gott og undanfarnu árini. Partar av vinnuni hava trupulleikar, og hjá summum er almenni karmurin ein spennitroyggja. Alivinnan er eitt gott dømi. Almenni myndugleikin má lurta eftir vinnuni, so at myndugleikar og vinna í felag finna eina loysn. Vit eru øll í sama báti, sum skal vinna upp land.

Vit hava nógvar ónýttar møguleikar, sum eru til staðar. Tað almenna er vorðið eigari av stórum parti av føroysku vinnuni, men kreppuloysnirnar í 90-árunum vóru ikki ætlaðar at verða varandi. Almenni ognarrætturin liggur sum ein dýna yvir framburði og dynamikki á vinnuliga leikvøllinum.

Fyritøkurnar skulu loysast úr almenna haftinum og einskiljast. Neyðugt er, at ein virðisbrævamarknaður virkar fullvæl. Men eru eingi virki til sølu, er eingin marknaður. Tí skal almenni eigarin ganga undan og seta vinnuligar ognir til sølu. Orkan skal ístaðin nýtast til at røkja tær uppgávur, ið hoyra tí almenna til.

Tað ræður um at vera málsøkin og stevnufastur.

Poul Michelsen

www.poulmichelsen.fo

XA
FÓLKAFLOKKURIN
*- Ábyrgd, álit og áræði*





## ÚTSØLA Á KÁTA HORNINUM

**Hesir handlar við Káta Hornið byrja útsøluna mánamorgunin klokkan 10:**

FANDANGO
avsláttur upp í ÷50%

STÁSIÐ
allar vørur ÷50%

BIXIN
allar vørur ÷50%

BASIC
avsláttur upp í ÷50%

**Skal tað vera útsøla, so lat tað vera útsølu!**





Vit halda kósina!

## Veruligan politikk ella vill vallyfti?

**Valið stendur ímillum:**

Fasta búskaparstýring - ella ongi langtíðarmál
Umhugsaðar ætlanir - ella stuttskygdan stuðul
Miðvísar útbyggingar - ella óstýrdar játtanir

Jógvan Arge
Tjóðveldisflokkurin
XE

www.jogvanarge.com



## VEL FRAMTÍÐINA!

